# Ecstasy í baksmekkuni á fløguhylki



*Ungi Klaksvíkingurin fekk ein pakka sendandi við postinum. Í pakkanum vóru tveir dvd-filmar, og í baksmekkuni á øðrum teirra lógu 200 ecstasy tablettir*

**Fríggjadagin vóru tríggir ungir mans dømdir í Føroya Rætti. Tveir teirra fingu ávikavist 7 og 10 mánaðir fongsul, meðan tann triði fekk treytaðan dóm**

RÆTTARMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Løgreglan hevur lagt nógv fyri seinastu tíðina, til tess at fanga fólk, sum innflyta og selja rúsevni til landið. Í Føroya Rætti fríggjadagin, har tríggir ungir mans vórðu ákærdir fyri at hava innflutt, selt, tikið og givið víðari ecstasy, kom fram, at løgreglan hevur arbeitt miðvíst við at avdúka narkoringin, sum nú fevnir um fimm mans. Umframt húsarannsóknir, bæði her á landi og í Danmark, kom fram, at hald er lagt á farteldur, og telefonútskriftir avdúka sambandið millum teir ákærdu. Undir rættarmálinum spældi ákæruvaldið upptøkur úr heiminum hjá einum ungum manni, sum er vavdur uppí eitt annað narkomál. Hetta er ikki sokallaða stóra ecstasymálið, sum eisini gongur fyri seg í hesum døgum.

### Krógvaðar í fløguhylki

Fríggjadagin var so rættarmálið ímóti trimum ungum monnum, sum millum annað vóru ákærdir fyri í felag at hava innflutt, keypt og selt ecstasy. Teir tríggir menninir úr ávikavist Havn, Runavík og Klaksvík, vóru ákærdir í tilsamans 12 førum. Ákærurnar fevndu um innflutning, nýtslu, sølu og keyp av rúsevnum, brot á ferðslulógina og harðskap.

Ein av høvuðsákærunum var móti tí yngsta manninum, har hann var ákærdur fyri at hava tikið ímóti einum pakka við 200 tablettum. Eftir øllum at døma, vórðu tablettirnar sendar til bústað hansara, krógvaðar í baksmekkuni á einum fløguhylki. 21 ára gamli maðurin noktaði seg sekan, tí hann segði seg ikki vita av, at tablettir vóru í pakkanum. Brot hansara var, at hann handaði pakkan til ein av hinum monnunum í rættinum fríggjadagin. Men av tí, at hann var ókendur av løgregluni, umframt at tað ikki kundi prógvast at hann var sekur, fekk hann bert treytaðan dóm.

### Játtaði seg sekan

Harafturímóti blivu hinir báðir ákærdu dømdir inn at sita í ávikavist 7 og 10 mánaðir.

Millum annað játtaði annar teirra seg sekan í at hava móttikið 135 ecstasytablettir.

Teir báðir menninir hava biðið um umhugsunartíð at kæra dómin. Høvuðsákærdi, sum varð tikin í Keypmannahavn, fekk 10 mánaðir. Hann hevur longu sitið varðhaldsfongslaður í tveir mánaðir.

---

# Drúgv grein um Føroyar í New York Times

The New York Times

**Erliga og fordómsfrítt greiðir amerikanski ferðamannablaðmaðurin Stephen Matcalf frá ferð síni í Føroyum í dagsins útgávu av stóra amerikanska tíðindablaðnum New York Times**

FERÐAMANNALÍV

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í greinini verður amerikanski avíslesarin vístur inn í ymsar krókar av føroysku nútíðini og fortíðini. Vitjað verður í Nólsoy og í Kirkjubø, farið verður í Stakkin, frágreiðing er frá slakti og grindadrápi, og hugleiðingar eru um oljuleitingarnar kring oyggjarnar. Eisini verður føroyska sjálvstýrismálið umrøtt, millum annað vinklað við USA og NATO. Prát er við bæði kendar og minni kendar føroyingar, og eisini ber til at síggja eitt filmklipp inni á heimasíðuni hjá blaðnum. Harumframt liggur eitt slideshow við frálíka góðum myndum, sum myndamaðurin Nadav Kander hevur tikið.

Fremmanda ferðafólkinum líkt, eru upplivingar og eygleiðingar í mentanini, sum undra. Eitt nú, at festið í Kirkjubø líka upp í okkara tíð er gingið í arv til elsta sonin. Í ferðafrágreiðingini kemur høvundurin nakrar ferðir við viðmerkingum til kynsmynstrið í Føroyum, har hann millum annað vísir á, at føroyingar eru gestablíðir: kvinnurnar bjóða monnunum drekkamunn og fara síðani út, so menninir kunnu fáa frið.

Í greinini sigur høvundurin, sum eitur Stephen Matcalf og er úr Brooklyn, at Føroyar helst er mest forvitnisliga staðið eftir í heiminum, og tað vakrasta, hann nakrantíð hevur vitjað.

Greinin í New York Times er sjáldsama væl frágingin og trúgv mótvegis Føroyum, í mun til tað, sum vit mangan lesa um Føroyar í útlendsku pressuni. Eisini er fjálgt at síggja, at høvundurin brúkar góð føroysk heimildarfólk sum keldur.

Heitið á greinini er Into the Mystical Unreal Reality of the Faroe Islands (Í gátuføra óveruliga veruleikanum Føroyum).

Greinin er at finna á: http://www.nytimes.com/2007/03/25/travel/tmagazine/03well.faroes.t.html

# Slóðbrótandi verkætlan hjá Krabbameinsfelagnum

**Føroya Felag móti Krabbameini fer nú undir at kanna tørvin hjá krabbameinssjúklingum á endurmenning, ið er tað sama sum rehabilitering**

HEILSUMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ætlar tú tær at arbeiða meðan tú ert í viðgerð? Roknar tú við broytingum í tínum fíggjarligu viðurskiftum orsakað av sjúkuni? Hevur tú kensluna av, at tíni næstu royna at verja teg? Tørvar tær hjálp?

Hesar og aðrar spurningar fáa krabbameinssjúklingar høvi at svara uppá, nú farið verður undir at kanna tørvin hjá sjúklingum á endurmenning, ið er tað sama sum rehabilitering.

Føroya Felag móti Krabbameini sigur í tíðindaskrivi, at tað er upp til hvønn einstakan at taka lut í kanningini ella ikki, og viðkomandi verður anonymur, men felagið vónar, at so nógv sum til ber taka av áheitanini. Bæði fyri at lýsa støðuna hjá krabbameinssjúklingum, men eisini fyri at skapa størri áhuga fyri endurmenning. Tað er umráðandi, at fakfólk og politikarar fáa at vita, hvat skal til, fyri at fólk, sum hava krabbamein, betur klára at laga seg til støðugu broytingarnar, sum sjúkugongdin er orsøkin til.

Sambært felagnum, er endamálið við kanningini at kortleggja upplivingarnar hjá tí sjúkurakta í sambandi við, at sjúkan er vorðin ein partur av gerandisdegnum. Harumframt er ætlanin at finna fram til, hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk soleiðis at sjúklingurin og avvarðandi hansara fáa best hugsandi stuðul at koma víðari í lívinum.

### Finna leiðreglur

At fáa staðfest krabbamein ávirkar við eitt bæði familju- og arbeiðslív. At fáa staðfestingina er í sjálvum sær nóg mikið at ávirka tann einstaka bæði likamliga og sálarliga, og er mangan viðvirkandi til, at sosialu sambondini verða broytt. Tað tænir bæði samfelagnum og tí einstaka, at funnið verður fram til hættir at nøkta tørvin hjá tí einstaka í hesum sambandi. Miðað verður eftir, at kanningin kemur fram til nakrar leiðreglur, ið kunnu verða nýttar í framtíðini, øllum krabbameinssjúklinum at gagni.

Kanningin verður gjørd í trimum umførum, við spurnablaði og samrøðum við útvaldar sjúklingar og avvarðandi. Kanningin verður gjørd í ár og úrslitið væntandi greitt síðst í árinum.

### Nýtt orð

Orsøkin til, at Krabbameinsfelagið er farið undir tørvskanning av endurmenning, er, at tilburðirnir av krabbameini økjast í tali, og at tey allar flestu, sum skulu liva við sjúkuni, merkja avleiðingarnar av sjúkuni eisini eftir, at sjúklingurin er sagdur frískur at vera.

Karen Heinesen hevur ábyrgdina av kanningini. Hon virkar sum sosialráðgevikonsulentur fyri Krabbameinsfelagið. Í 2003 og 2004 tók hon lut í arbeiðinum hjá Nordisk Cancer Union at gera felags leiðreglur. Tað eru royndirnar frá hesum arbeiði, ið eru íblásturin til kanningina.

Felagið sigur, at í sambandi við hesa verkætlanina verður á fyrsta sinni orðið endurmenning nýtt fyri orðið rehabilitering – við loyvi frá Málstovuni og Málnevndini.